# Tofta skúla

Hesi størv eru leys at søkja fyri skúlaárið 2005/2006

- 2 fulltíðar lærarastørv fyri lærara í farloyvi
- 2 fulltíðar lærarastørv vegna avlopstímar, og serligan tørv. Tímarnir til serligan tørv eru ávikavist 12 og 9 tímar
- 1 lærarastarv uml. 12 tímar pr. viku, vegna avlopstímar og serligan tørv (endaliga ásett eftir 1. sept. 2005)
- 1 fulltíðar lærarastarv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. aug. 2005 til 31. mars 2005
- 1 fulltíðar lærarastarv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. aug. 2005 til 31. des. 2005

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarfelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

- 1 starv sum stuðul, 15 t/v
- 1 starv sum stuðul, 5 t/v
- 1 starv sum stuðul, 5 t/v

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Øll størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2005/2006 uttan tey bæði størvini vegna barnsburðarfarloyvi.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 447332.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2005.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
FO-650 Toftir

TJÓÐPALLUR FØROYA

# Búmerkjakapping

Tjóðpallur Føroya bjóðar øllum at gera uppskot til búmerki hjá Tjóðpallinum. Búmerkið skal brúkast á heimasíðu, brævpappíri, plakatum, lýsingum og øðrum, ið Tjóðpallurin letur úr hondum. Tað skal tí á onkran hátt lýsa endamálið og uppgávurnar hjá Tjóðpallinum.

Støddin á tekningini skal vera uml. 21x29 cm (A4). Búmerkið skal vera í upp til 3 litum á hvítari bakgrund, skal vera einfalt í strikuni, so hon kann minkast í støðd til uml. 1,5x1,5 cm. Harumframt skal búmerkið vera egnað at prenta í svørtum/hvítum.

Tekningarnar skulu ikki vera signeraðar, men eitt fimmsiffrað tal verður sett við lítlum í niðasta vinstra hornið á tekningini. Navn, bústaður og telefonnummar verður lagt hjá í afturlatnum brævbjálva, sum hevur sama tal sum á tekningini.

Øll kunnu luttaka í kappingini. Uppskotini skulu vera Tjóðpallinum, Postrúm 212, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. juni 2005 kl. 12.00.

Ein dómsnevnd við 4 fólkum velur millum uppskotini. Limirnir í dómsnevndini eru: Ingvør Nolsøe, Anker Mortensen, Annika Sølvará og Jenny C. Petersen.

*Latnar verða 3 virðislønir:*
1. virðisløn kr. 15.000
2. virðisløn kr. 7.000
3. virðisløn kr. 5.000

Tjóðpallurin tilskilar sær rætt til at velja frítt, um vinnarauppskotið ella annað uppskot verður brúkt til endaliga búmerkið.

Uppskotini verða sýnd fram í sambandi við næstu framførsluna hjá Tjóðpallinum.

Tjóðpallur Føroya er almennur stovnur, skipaður við Løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003. Játtanin til Tjóðpallin er 2,4 mió kr. í 2005

**Tjóðpallurin skal sambært lógini**
- í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði eins og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk
- geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist - sjónleiki so væl sum aðrari palllist
- tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra
- skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum
- fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum

Lógarteksturin við viðmerkingum liggur á heimasíðu Løgtingsins:
http://www.logting.fo/logtingsmal/logtingsmal02/vanlig%20tingmal/093.02%20tjodpallur%20foeroya.htm

TJÓÐPALLUR FØROYA

# ÓLAVSØKU FRAMSÝNINGIN 2005

Listafelag Føroya skipar fyri ólavsøkuframsýning í Listasavni Føroya. Øll kunnu senda inn verk til framsýningina.

Verkini skulu vera felagnum í hendi í seinasta lagi tann 15. juli. Saman við verkunum skal vera listi við upplýsingum um myndaheiti, tøkni og prís um verkini eru til sølu. Øll verkini skulu vera týðiliga merkt samsvarandi listanum.

Felagið hevur heitt á Eyðun av Reyni, Louisu Lamhauge og Zacharias Heinesen um at vera úrtøkunevnd og skipa fyri framsýningini.

**Listasavnið er opið:**
mánadag til fríggjadag kl. 11.00 - 17.00
leygardag og sunnudag kl. 14.00 - 18.00

LISTAFELAG FØROYA
Gundadalsvegur 9 · Postsmoga 1141
FO-110 Tórshavn · listafelag@post.olivant.fo

Gallarí Jinx



Verkstaðið á Brekku

hevur framsýning í mai 2005

tel 317101 · jinx@jinx.fo

Musikkskúla

# KONSERT

Í Trongisvágshøllini
týsdagin 24. mai
kl. 17.00 til 20.00



Musikkskúlin í Suðuroy